# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Andras Joensen 60 ár



Í dag, fríggjadagin tann 23. september 2005 fyllir Andras Joensen í Klaksvík 60 ár. Hann er gerðamaður, og hann hevur í mong ár verið við til at seta dám á Klaksvíkina.

Andras, sum er føddur í 1945, er elstur av teimum trimum børnunum hjá Onnu og Jógvani Martin, bónda í Gerðum. Anna var úr Nornastovu í Mikladali, og Jógvan Martin úr Niðristovu í Gerðum. Andras eigur tvær systrar, Elinborg og Hjørdis, sum báðar búgva í Klaksvík. Elinborg er gift Ólavi Samson, og Hjørdis er gift Heina Mohr. Merkisvert er tað, at í dag, 60 ára føðingardagin hjá beiggjanum, er 50 ára føðingardagur hjá Hjørdis.

Andras var borin til at taka við ábyrgd av Niðristovugarðinum, og tað kann ikki annað sigast, enn at hann hevur gingið høgt upp í, og at hann hevur havt gott hegni at bóndast. Andras hevur stóran alsk til seyð og seyðahald, og røktina av Niðristovugarðinum hevur ógvuliga stóran týdning fyri hann liggur honum.

Andras hevur eisini verið uppi í almennum tiltøkum, sum hava við seyð og seyðahald at gera. Fyri nøkrum árum síðani var hann ein av stigtakarunum at endurstovna seyðasýningarnar, sum í dag rættiliga eru komnar aftur til lívs kring landið. Hann er eisini fróðarmaður, og hann veit nógv at siga frá – ikki minst um Gerðar og hagan, sum liggur til garðin, bæði fyri Heiman og eystanfyri Kvígingarskarð.

Sum tjóðskaparligur hugsjónarmaður hevur Andras eisini hjarta fyri siðaarvi føroyinga. Hetta sæst millum annað aftur í leikluti hansara í Grindamannafelagnum og innan ullvirking, har hann er ein av undangongumonnunum og stigtakari saman við øðrum góðum fólki.

Andras er útbúgvin timburmaður og var sum slíkur arbeiðsformaður hjá Byggifelagnum Kanjon í nøkur ár, áðrenn hann í 1987 tók við starvi sum vegformaður hjá Klaksvíkar Kommunu. Hann hevur sostatt verið vegformaður í skjótt 20 ár.

Andras hevur sitið eitt áramál í nevndini fyri Klaksvíkar Handverkarafelag, og sat eitt skifti í Klaksvíkar Býráð valdur fyri Fólkaflokkin.

Andras hevur stórt hjarta fyri heimbýnum. Hetta kemur til sjóndar bæði í starvi hansara hjá kommununi og í frítíðini, har hansara partur í Klaksvíkar Ítróttarfelag ikki liggur eftir. Eitt skifti var hann limur í fótbóltsnevndini, og hann hevur altíð verið klárur at taka tøk fyri felagið. Dømi um hetta eru tær mongu ferðirnar á vári, tá ið Andras hevur staðið á odda fyri at rudda kava av fótbóltsvøllinum, so KÍ kann sleppa at spæla heimadyst.

Andrasi dámar sera væl at skapa hugna, og hann hevur eisini framúr hegni til tað, bæði privat og eisini í sambandi við almenn tiltøk. Eitt sigandi dømi um hetta var millum jól og nýggjar fyri nøkrum árum síðan, meðan kavin lá tjúkkur. Tá tók hann stig til ein serligan kavamannahugna á fótbóltsvøllinum. Lýst varð í útvarpinum, og tað var so skjótt, at ein rúgva av fólki var savnað á vøllinum – børn og vaksin hvørt um annað – og felags fyri øll var, at tey í barnsligum kæti stríddust og kappaðust um at gera kavamenn og annars hugnaðu sær í stilla vetrarveðrinum.

Í 1967 giftist Andras við Sølvu, dóttir Emmu og Sam Jacobsen í Búðunum. Tey bygdu í Gerðum – tætt við hjá foreldrum hansara, og har eiga tey gott og hugnaligt heim. Sølva og Andras eiga tvey børn, Jógvan, ið eins og pápin er útbúgvin timburmaður, og Jórun, sum er hárfríðkanarkvinna. Bæði børnini búgva í Gerðum.

Nú Andras rundar tey seksti, eigur hann fimm abbabørn. Jógvan og Borghild eiga tvey, og Jórun og Jan eiga trý børn.

**80 ára føðingardagur**

Í dag, tann 23. september fyllir Diana Klein, Um Heygar 2, 530 Fuglafjørður, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin tann 24. september í Lonini í Fuglafirði frá kl. 18.00.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum sum sýndu samkenslu, tá elskaði pápi, verpápi og abbi okkara

**Carl Hilmar Olsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum øll sum á ymiskan hátt hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Takk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serlig tøkk til tykkum í Ebenezer.

*Familjunnar vegna*
**Hansa, Martin, Laila og Maibritt**

**Dagurin**
**23. september. Linus,** deyður í árinum 79. Var fyrsti eftirmaður Pæturs á pávastóli í Róm. Halgisøgur siga, at hetta er tann Linus, sum nevndur er í 2. Tim. 4, 21, men tað vita teir so ikki við vissu.
*Dagurin er eisini heystjavndøgur.*

## Næmingar í starvsvenjing

Hesar seinastu vikurnar hava næmingar úr fleiri skúlum verið í starvsvenjing í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Her verður alt gjørt fyri at tey skulu fáa tey eitt ávíst innlit í, hvussu eitt nútíðar miðlahús arbeiðir. Tey eru við tá tíðindafólkini arbeiða og tá myndamenninir eru úti í sínum ørindum. Og tey sleppa sjálvandi eisini at skriva greinar um ávís evni.



*Tær tríggjar - Katrina Eyðunsdóttir Hansen og Elsa Maria H. Hansen úr Norðragøtu og Mariann Mikkjalsdóttir av Tvøroyri – vóru týsdagin ein túr í Kalsoynni saman við tíðindamanni og myndamanni. Her við Djúpadal*



*Dia Johansen av Strondum og Maria B. Hansen avmyndað í Gjógv, ein dagin tey vóru saman við tíðindamanni og myndamanni í Gjógv*

Tvær tær seinastu vikurnar vóru Dia Johansen av Strondum og Maria B. Hansen úr Klaksvík í starvsvenjing her í Miðlahúsinum.

Hesa vikuna og ta komandi eru tríggir næmingar aftrat komnir í starvsvenjing – tær eru Katrina Eyðunsdóttir Hansen og Elsa Maria H. Hansen úr Norðragøtu og Mariann Mikkjalsdóttir av Tvøroyri.